# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 9. mars 2020 |
| Mál nr.: | 18/00074 |
| Málsviðgjørt: | Jenny Lydersen |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**undirvísing í føroyskum sum annaðmál**

Við heimild í § 5, stk. 6 í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan verður ásett:

**Málbólkur**

**§ 1.** Næmingar, sum hava eitt annað móðurmál enn føroyskt, og sum ikki hava lært føroyskt, áðrenn teir byrja í fólkaskúlanum, kunnu fáa serstaka undirvísing í føroyskum.

*Stk. 2.* Málbólkurin er tilflytarar og næmingar, sum búgva í Føroyum, men sum vaksa upp í einum umhvørvi, har føroyskt ikki er høvuðsmálið, og sum tí hava vantandi førleika at tosa og skilja føroyskt.

**Leggja undirvísingina til rættis**

**§ 2.** Næmingar, sum hava tørv á undirvísing í føroyskum sum annaðmál, hava rætt til ískoytisundirvísing í føroyskum.

*Stk. 2.* Skúlin tekur í samráð við foreldrini, næmingin og flokslæraran stig til, at næmingar fáa undirvísing í føroyskum sum annaðmál.

*Stk. 3.* Tá ið næmingar, sum hava føroyskt sum annaðmál, verða innskrivaðir, ger skúlin eina meting um, hvønn tørv, einstaki næmingurin hevur á ískoytisundirvísing í føroyskum.

*Stk. 4.* Skúlin leggur ískoytisundirvísingina í føroyskum til rættis saman við lærara, ið hevur fakligan og námsfrøðiligan førleika at undirvísa í føroyskum sum annaðmál.

*Stk. 5.* Flokslærarin boðar í skúlaárinum sambært § 4 í kunngerð nr. 37 um flokslæraran frá 26. mars 2003 leiðsluni skrivliga frá, um næmingar hava tørv á ískoytisundirvísing í føroyskum.

## Skipan

**§ 3.** Ískoytisundirvísing í føroyskum sum annaðmál kann verða skipað sum

1) partur av lærugreinum í vanligu undirvísingini í flokkinum
2) bólkaundirvísing, í móttøkuflokki ella sum einstaklingaundirvísing

*Stk. 2.* Einstaklingaundirvísing verður bara skipað í serligum førum, har fáir næmingar eru, sum hava tørv á ískoytisundirvísing, ella um mett verður, at næmingurin ikki hevur møguleika at menna seg málsliga í einum næmingabólki.

*Stk. 3.* Leiðsla skúlans tekur í samráð við flokslæraran og flokstoymið støðu til í hvørjum lærugreinum umframt føroyskum, ið ískoytisundirvísing verður skipað.

*Stk. 4.* Tímatal og tíðarskeið fyri ískoytisundirvísingina sbrt. stk. 1-3 verða skipað í mun til tørv og fortreytirnar hjá næminginum.

*Stk. 5.* Næmingatalið í bólkum sambært stk. 1, 2. pkt. eigur í mesta lagi at verða sjey næmingar, tá ið undirvísingin byrjar. Næmingatalið kann tó verða hækkað seinni í skúlaárinum ella næsta skúlaárið í mun til førleikan hjá næmingunum.

**§ 4.** Móttøkuflokkur sambært. § 3, stk. 1, 2. pkt. kann verða skipaður í skúlum, har nógvir næmingar, sum hava tørv á undirvísing í føroyskum sum annaðmál, verða innkskrivaðir eitt skúlaár. Næmingabólkar kunnu eisini verða lagdir saman til ein móttøkuflokk.

*Stk.2.* Skúlar í somu kommunu kunnu samstarva um móttøkuflokk. Eisini ber til at skipa móttøkuflokk í samstarvi millum kommunur.

*Stk. 3.* Næmingar kunnu í byrjanini hava alla ella ein part av undirvísingini í móttøkuflokki. Miðað verður eftir, at næmingarnir so skjótt sum til ber kunnu verða partur av floksundirvísingini.

*Stk. 3.* Næmingatalið í einum móttøkuflokki skal í minsta lagi vera 6 næmingar og í mesta lagi 12 næmingar. Næmingatalið kann vera hægri, um tveir lærarar undirvísa í flokkinum, og eisini um næmingarnir sum heild hava sama málsliga tørv og fortreytir, tó í mesta lagi 18 næmingar.

*Stk. 4.* Ein móttøkuflokkur skal í mesta lagi fata um trý floksstig, men kann fata um fleiri floksstig, um næmingarnir sum heild hava sama málsliga tørv og fortreytir, tó í mesta lagi fimm floksstig.

**§ 5.** Næmingar, sum fáa undirvísing í føroyskum sum annaðmál kunnu við samtykki frá foreldrunum í serligum føri verða frítiknir fyri undirvísing í lærugreinum sbrt. § 5, stk. 2, § 7, stk. 1 og § 9, stk. 1 í fólkaskúlalógini, tó ikki í føroyskum og støddfrøði.

*Stk. 2.* Næmingur, sum verður frítikin fyri undirvísing í lærugreinum sbrt. stk.1 skal ístaðin hava aðra undirvísing, sum stimbrar hugin at læra og kveikir málsligu menningina. Undirvísingin kann snúgva seg um viðurskifti, sum næmingurin kennir og um føroyska mentan og samfelagsviðurskifti.

*Stk. 3.* Skúlin tekur í samráð við foreldrini avgerð um, at næmingar fyrstu mánaðirnar kunnu hava lægri tímatal enn ásett er fyri hvørt floksstig samanber § 19, stk. 2 og 5 í fólkaskúlalógini.

Stk. 4. Lærarar, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál, skulu hava royndir at undirvísa í føroyskum sum annaðmál og skulu hava førleikament seg innan økið.

## Umsókn um tímajáttan

**§ 6.** Skúlin sendir í seinasta lagi 15. februar á hvørjum ári Undirvísingarstýrinum umsókn um tímar

til ískoytisundirvísing í føroyskum sum annaðmál.

Stk. 2. Umsóknin skal lýsa tørv skúlans á ískoytisundirvísing, og hvussu skúlin ætlar at skipa undirvísingina. Eisini verður greitt frá, um skúlin ætlar at samstarva við aðrar skúlar um móttøkuflokk ella næmingabólk.

Stk. 4. Saman við umsóknini verður lagt upplýsingarskjal fyri hvønn næming, har greitt verður frá:
1. Fortreytum næmingsins sum
a) navn og aldur næmingsins
b) í hvørjum flokki næmingurin skal byrja
c) úr hvørjum landi næmingurin er, og hvat er hansara móðurmál
d) um næmingurin dugir onnur mál
e) nær næmingurin er fluttur til Føroya
f) um næmingurin hevur fingið undirvísing í føroyskum frammanundan
g) um foreldrini tosa ella skilja føroyskt

2. Upplýst verður, hvussu skúlin ætlar at skipa undirvísingina hjá næminginum
a) í næmingabólki
b) sum einstaklingaundirvísing
c) í móttøkuflokki

**Gildiskoma**

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið
9. mars 2020

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen
aðalstjóri